HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

«Name»
«Address»
«Mail_address»
«Country»

26. september 2017
Mál: 17/00588-2
Tygara skriv:
Viðgjørt: SP/HiH

**Uppskot til kunngerð um at fyribyrgja dálking frá oljutangum til hoyringar**

Hoyringarfreistin er sett til **fríggjadagin 2. november 2017**.

Hjálagt verður sent til hoyringar uppskot til kunngerð um at fyribyrgja dálking frá oljutangum. Ætlanin er, at kunngerðin skal galda fyri oljutangar upp til 6.000 litrar.

Í 2006 gjørdi ein arbeiðsbólkur undir leiðslu av Umhvørvisstovuni uppskot til kunngerð um oljutangar til sethús, sum varð sent til hoyringar og vórðu hoyringarsvarini viðgjørd og arbeidd inn í uppskotið. Kunngerðin varð tó ongantíð sett í gildi. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur tí heitt á Umhvørvisstovuna um at endurskoða uppskotið. Tað er hetta endurskoðaða uppskot, sum nú verður sent til hoyring.

Uppskotið ásetur krøv til eigarar av oljutangum, krøv til veitarar av olju og krøv til innflytarar og seljarar av oljutangum. Harafturat er krav um, at oljutangar skulu vera góðkendir, og um, hvussu oljutangar verða settir upp ella grivnir niður, um merking og skráseting av tangum og um, hvussu tangar verða tiknir úr nýtslu. At enda er krav um, at oljutangar skulu takast úr nýtslu, tá teir fara upp um ávísan aldur.

Skipað verður fyri **almennum hoyringarfundi mikudagin 18. oktober 2017, kl. 10:00** í Heilsu- og innlendismálaráðnum, Eirargarður 2. Boðast skal frá luttøku í seinasta lagið mánadagin 16. oktober kl. 12:00. Á hoyringarfundinum verður uppskotið gjøgnumgingið og høvið verður at seta spurningar.

Heitt verður á hoyringarpartarnar um at lata **Heilsu- og innlendismálaráðnum**, t.e. himr@himr.fo møguligar viðmerkingar til hjálagda uppskot í seinasta lagi **fríggjadagin 3. november 2017**. Hoyringarpartarnir eru eisini vælkomnir at boða frá, um ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Kunngerðauppskotið liggur eisini tøkt á heimasíðuni www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo